# Ársfrágreiðing

# 2011

NORÐOYATUNNILIN

**27. mars 2012**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 27. mars 2012

**(fyri árið 2011)**

## 1. Nevndin og felagið

Nevndin hevur í 2011 havt 6 fundir.

Á seinasta aðalfundi vóru allir 4 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald: Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Johanna á Bergi og Heri M. Hammer. Nevndin skipaði seg við Bergur í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni.

Síðani virksemið byrjaði, hevur felagið havt egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7. Tá hesi húsini vórðu seld í juni 2011, varð leigumálið samstundis uppsagt. Felagið er síðan flutt inn í onnur skrivstovuhølir við bústaði á Hoyvíksvegi 65, sum felagið leigar frá Norðoya Sparikassa.

Raksturin er skipaður í samstarvi við P/F Vágatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Vágatunnilin. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2011 27,1 mió. kr. og er hetta 1,3 mió. kr. meira enn fíggjarætlanin, sum varð løgd fyri 2011. Av rakstrinum fóru 3,4 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, 2,3 mió. kr. til innkrevjing og fyrisiting, 0,5 mió. kr. til tryggingar, 1,9 mió. kr. til el, 11,2 mió. kr. til avskrivingar og 3,9 mió. kr. til rentur.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á kr. 4,5 mió. kr., sum er 4,1 mió. kr. betur enn árið fyri.

# 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, at útvega fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. el-innstallatiónunum, pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligt eftirlit í tunlinum v.m.

Norðoyatunnilin hevði ábyrgd av at taka arbeiðsvegin, sum bleiv nýttur í sambandi við tunnils-arbeiðið og sum lá gjøgnum fjøruna í Leirvík, burtur, og fjøran skuldi endurskapast til upprunaligan stand. Eisini átti Norðoyatunnilin eina stóra grótrúgvu, sum lá á einum øki hjá Eysturkommunu niðri á Kráartanga. Í sambandi við, at arbeiðið við nýggja vegnum gjøgnum Leirvíkar bygd byrjaði í 2011, bleiv avtala gjørd við RTS-samtakið um burturbeining av arbeiðsvegnum og grótrúgvuni.

Ofta eru feilir við viftunum í tunlinum orsaka av, at mótstøðan í el-motorunum blívur ov stór. Í 2011 hava vit høvuðsumvælt tríggjar viftur, og tað vísti seg, at lejini vóru farin. Hetta er ein trupulleiki, sum møguliga eisini er galdandi fyri fleiri av hinum viftunum. Orsaka av at tunnilin er formaður sum eitt U, hendir tað ofta, at vindurin liggur inn í báðar tunnilsmunnarnar, og harvið verður eingin natúrligur trekkur gjøgnum tunnilin. Hetta viðførir, at vifturnar koyra sera nógv í Norðoyatunlinum, og streymnýtslan til vifturnar er mett til umleið 300-400 túsund krónur árliga.

SRO-yvirvakingarskipanin fyri Norðoyatunnilin hevur alla tíðini virka sera illa. Tað kundu gott koma fleiri hundrað alarmar hvønn dag, og teir komu frá neyðtelefonum, eldsløkkjarum v.m. Trupulleikin viðførdi, at servarin á alarmsentralinum misti sambandið við tunnilin, og neyðugt var tí at endurstarta servaran á alarmsentralinum og routaran úti í tunlinum. Í 2011 settu vit okkum í samband við eina norska fyritøku, sum hevði kunnleika til ljósleiðarar og fipurnet. Hendan setti seg síðani í samband við eina fyritøku, sum hevði kunnleika til switchir. Í november 2011 vóru hesar fyritøkur í Norðoyatunlinum og gjøgnumgingu alt netverkið og dagførdu allar switchirnar. Í dag er trupulleikin við teimum følsku alarmunum burtur, og SRO-skipanin koyrir sera stabilt.

Síðan lekarnir vóru á pumpuleidninginum í 2008, hevur nógv samskifti verið millum Norðoyatunnilin og Føroya Konsortiið. Eisini hava sakførarar og referancebólkurin verið inni í málinum. Á sumri 2011 bleiv ein endalig semja gjørd millum Norðoyatunnilin og Føroya Konsortiið um endurgjald viðvíkjandi pumpuleidninginum, og í hesum sambandi bleiv garantiið viðvíkjandi pumpuleidninginum longt til apríl 2013, og tá skuldi onki verið útistandandi millum Norðoyatunnilin og Føroya Konsortiið.

Pumpuverkið í Norðoyatunlinum hevur koyrt gott. Høvuðseftirlit er gjørt av einum pumpusetti. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, hevur verið støðug, uml. 1600 tons um samdøgrið, ella 180 litrar/min/km, sum er sama nøgd, sum tá tunnilin opnaði.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki hendingar, sum vit meta kunnu hava møguliga ávirkan á komandi ársroknskap.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini vóru við árslok 2011 75,5 mió. kr. eftir at gjalda niður. Skuldin við árslok 2010 var 97,4 mió. kr. Felagið hevur í 2011 rindað 3,9 mió. kr. í rentu og rindað avdráttir uppá 21,9 mió kr.

Sambært lániskjalinum skuldi restskuldin verið 95,0 mió. kr. Men av tí at felagið hevur havt eitt gott gjaldføri seinnu árini, hevur felagið plasera peningin á lánið, tí mett er at vit á henda hátt fingu bestu rentuna. Við at gjalda eykagjøld á lánið, hevur felagið goldið avdrøg fram til juni 2013.

## 2.3 Ferðsla, nýtslugjald og gjaldstøð

Ferðslan hevur í 2011 verið í miðal 1993 akfør/samdøgur, í mun til 1937 akfør/samdøgur í 2010, ein vøkstur á 2,8%.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar í frá 2007 til 2011.




Mynd 1. Miðalferðsla pr. dag

Á næstu mynd er víst indeks fyri ferðsluna síðan tunnilin lat upp 29. apríl 2006, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2006 er sett til 100). Ferðslan fyri 2006 er mett ferðsla fyri alt árið, av tí at tey faktisku tølini einans eru fyri gott 8 mánaðir.




Mynd 2. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu

Gongdin vísur at samlaða ferðslan er nakað størri í mun til árið fyri, men at tey, ið gera nýtslu av tunlinum, gjalda eitt sindur meira fyri hvønn túrin.

Samlaða ferðslan síðan tunnilin opnaði, tølini niðanfyri, svara til mynd 3:

| Ár | Akfør |
|---|---|
| | |
| **2006** | 448.884 |
| **2007** | 662.828 |
| **2008** | 694.398 |
| **2009** | 698.460 |
| **2010** | 707.202 |
| **2011** | 727.316 |




Mynd 3. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2006 til 2011. Árini 2004 og 2005 vísa hvussu nógv fóru um fjørðin við ferju.

Tað skal viðmerkjast, at ferðslutølini fyri 2006 eru frá 29. apríl 2006, tá tunnilin opnaði. Sostatt eru 8 mánaðir taldir við í 2006. Tølini fyri 2004, 2005 og partvís 2006 eru tøl tá ferjan sigldi.

Ì desembur avgjørdi nevndin at lækka prísirnar við millum 8% - 10% á kubbahaldum. Lækkingin varð sett í verk frá 1. januar 2012, og fær sostatt ávirkan á roknskapin fyri 2012. Í ætlanini er hædd tikin fyri hesi lækking.

Miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, broyttist nakað tey fyrstu árini, men er síðan 2008, tá miðalprísurin var kr.  73,40, er prísurin ikki broyttur munandi. Í  2009 var prísurin kr. 76,40 í miðal,kr. 71,50 í 2010 og í 2011 hevur miðalprísurin verið kr. 74,60.  Teir nevndu prísirnir eru teir, ið skuldskrivað verður, tá koyrt verður framvið gjaldstøðini. Hetta gevur ein miðalprís í 2011 á kr. 37,30 hvønn vegin.




Mynd 4. Miðalgjald  pr. akfar í frá 2006 til 2011.

Arbeitt verður áhaldandi við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga fyri kundarnar. Verðandi gjaldskipan hevur verið í nýtslu í útvið 10 ár í Vágatunlinum. Arbeitt verður við at fáa tilvega tilboð uppá møguliga uppdateraða  gjaldskipan.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Vágatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.4 Nøgdsemiskanning – Gallup Føroyar

Saman við Gallup Føroyar hava vit gjørt eina nøgdsemiskanning, og fingið svar uppá ymsar spurningar, sum eru viðkomandi í samband við innkrevjing o.a. Hetta er fjórða kanningin Gallup hevur gjørt fyri felagið. Undanfarnu kanningar eru gjørdar í 2004, 2005, 2007 og nú 2011.  Kanningin er grundað á samrøður umvegis telefon. Tilsamans luttóku 527 tilvildarliga útvaldir persónar við atliti til kyns-, alders- og fólkabýtið kring Føroyar sum heild. Frágreiðingin liggur á heimasíðu felagsins.

Spurningarnir snúðu seg m.a. um hvussu ofta fólk hava gjørt nýtslu av tunlinum. Av teimum spurdu hava 97% verið gjøgnum tunnilin. Eisini var spurt um hvørji ørindi tey oftast hava havt,  tá tey ferðast gjøgnum tunnilin. Her svaraðu 50% at tey nýta tunnilin í samband við frítið og ítrott, 29% vitja vinir og kenningar og 12% nýta tunnilin til arbeiðis.Kanningin vísir eisini at tað eru fleiri sum hava fingið sær kubba. Í seinastu kanning høvdu 29% goldið við rokning, í mun til 50% í 2007. Í seinastu kanning høvdu 49% kubba í mun til 38% í 2007.

## 2.5 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast verða ein liður í hjálpararbeiðinum um, óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Smærri venjingar, skipaðar av lokalu brandmyndugleikunum, hava verið í tunlinum í 2011.

## 2.6 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár var avtala gjørd um, at ársdagarnir tá ávikavist Norðoyatunnilin og Vágatunnilin lótu upp fyri ferðslu, skal einki nýtslugjald latast tá koyrt verður, tó verða hesir dagar lagdir til nærmasta leygardag. Umframt ársdagarnar eru 2 dagar lagdir í samráð við handilsfelagið í økinum. Dagarnir við fríari ferðslu hava stuðlað upp undir at vinnan og áhugabólkar í Norðoyggjunum hava skipað fyri serligum tiltøkum, eins og kunnleikin til tunnilin og áhugin fyri at ferðast er øktur.

Teir dagar frítt varð at koyra, koyrdu íalt 19.510 í 2011. Undanfarin ár hevur ferðslan verið 20.994 akfør í 2010, 21.660 akfør í 2009, 23.764 í 2008 og 30.486 akfør í 2007

## 2.7 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/F Vágatunnilin um felags rakstur, útreiðslurnar verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

## 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

# 4. Rakstraræltlan fyri 2011

Høvuðstølini í rakstraræltlanini fyri 2011 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 25,2 |
| Rakstur tunnil og vegir | -6,3 |
| Rakstur innkrevjing | -2,5 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 16,4 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -11,7 |
| Fíggjarpostar | -2,9 |
| **Ársúrslit** | 1,8 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 11,7 |
| Avdráttur | -7,6 |
| **Likviditetsavlop** | 5,9 |

Bert smærri íløgur hava verið í 2011.

Støðisognin er við árslok uml. 308,5 mió. kr.. Ávísar íløgur skulu væntast í 2012.

# 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- At úrslitið hjá felagnum gjørdist betri enn  tað sum varð ásett í ætlanini fyri 2011
- Avgerð um at lækka prísirnar fyri kubbahald
- Prísbygnaðurin er eins fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin

Tórshavn 27. mars 2012

| | |
|---|---|
| Bergur í Garði, formaður | Jens Kári Vilhelm, næstformaður |
| Jóhanna á Bergi, nevndarlimur | Heri M. Hammer, nevndarlimur |
| | / Uni Danielsen, stjóri |